## Leiðbeining til næmingar

# Skrivlig próvtøka

## Formligt

- Tú skalt skriva ein samanhangandi tekst við støði í eini uppgávuorðing, sum fevnir um ein ella fleiri tekstir, sum skulu viðgerast við hóskandi fakligum háttalagi og setast í frásjón.
- Hóskandi longd á tínum teksti er uml. 3 síður á 2.400 sløg.
- Reglufrástøðan skal vera 1,5, og skriftstøddin skal vera 12.
- Brúka skrift við fótum, t.d. Times New Roman.
- Sitat skulu frámerkjast við skákskrift ella gásareygum.
- Brúkar tú keldur, sum ikki eru partur av próvtøkutilfarinum, skulu tær uppgevast inni í tekstinum, ikki í fótnotu.

## Tekstslag

Teksturin, sum tú skalt skriva, skal vera ávíst tekstslag. Tú kanst velja millum tekstsløgini *greinandi grein* og *kjakandi grein*. Hesi tekstsløg hoyra bæði til tekstslagið grein. Ein grein er ein faktatekstur, sum kann almannakunngerast og verða lisin av áhugaðum lesarum.

Tú ert sendari. Tá tú skrivar, skalt tú hava ein móttakara í huganum, sum er áhugaður í mentan, bókmentum og miðlum. Móttakarin er væl kunnaður um danskar miðlar, bøkur, filmar og tíðarbær kjak og danska bókmentasøgu. Móttakarin kennir so statt eisini til danskfaklig hugtøk sum t.d. *fortællesynsvinkel*, *flashforward* og *metafor*. Hetta merkir, at tað ikki er neyðugt at skilgreina hesi, tá tey verða nýtt.

Grein er ein samanhangandi tekstur við inngangi, buli og útgangi. Inngangurin skal nerta við týðandi tættir í viðgerðini og vekja áhugan hjá lesaranum at lesa víðari. Í bulinum svarar tú uppgávuorðingini, og útgangurin er ein samanumtøka. Yvirskriftin er avgjørd frammanundan og verður upplýst í heftinum.

Í greinini hjá tær nýtir tú vitan og tekstir. Tú skalt nevna tekstirnar, sum tú brúkar. Hetta gert tú við at nevna høvund, heiti og árstal fyrstu ferð, teksturin verður nevndur. Til próvtøkuna skalt tú nevna tekstirnar, sum hoyra til einstøku uppgávuna. Roknast skal ikki við, at móttakarin kennir til tekstirnar ella uppgávurnar til skrivligu próvtøkuna. Tú skalt altíð vísa til møguligt tilfar, sum tú tekur við í greinina.

## Greinandi grein

Tá tú skrivar eina greinandi grein, skalt tú kanna ein tekst við at nærlesa hann við atliti at greining, tulking, frásjónargerð og meting. Teksturin kann vera munnligur, skrivligur ella margháttaður. Uppgávan hjá tær er at miðla tína tekstfatan greitt fyri einum lesara, sum ikki kennir tekstin. Tú skalt greiða lesaranum frá um tekstin, og hvussu teksturin skal skiljast, eisini tað, sum stendur millum reglurnar. Tað hevur týdning, at tú í greiningini fert ítøkiliga til verka, vísir til brot í tekstinum, lyftir teg upp um tekstin og nýtir viðkomandi greiningarhugtøk. Tá tú vísir til ymiskt í tekstinum, er

umráðandi, at tú greiðir lesaranum frá um tað og greinar tað. Um uppgávuorðingin krevur tað, skalt tú eisini í eini frásjónargerð lýsa, hvussu teksturin kann skiljast í einum størri høpi, t.d. bókmentasøguligt, tematiskt ella sum tekstslag.

Tað, sum sermerkir góðu greinandi greinina, er, at víst verður á høvuðspunktini um *hvat*, *hvussu* og *hví* í tekstinum, og at greiningin, tulkingin og metingin eru miðlað greitt og samanhangandi. Minst til, at greinin hjá tær skal leiða lesaran til eina heildarfatan og frásjónargerð av tekstinum.

**Vanlig skrivihátttaløg**: greiða frá, lýsa, prógva, greina, tulka, meta, seta í frásjón.

**Tekstsløg, sum minna um**: ummæli, høvunda- ella verkævisøgur, fyrilestrar um bókmentir, list ella film, poddvarp/útvarp/sjónvarp um mentan, retoriskar greiningar av røðum, bókmentaligar granskingargreinar.

## Kjakandi grein

Tá tú skrivar eina kjakandi grein, skalt tú kanna ella kjakast um eitt tíðarbært kjakevni ella ein tíðarbæran spurning. Endamálið við greinini er við einum kjaki at geva lesaranum innlit í eitt evni og ymisk sjónarmið gjøgnum ymisk sjónarhorn. Hetta kanst tú m.a. gera við at nýta snildir frá samskiftisgreining. Greinin skal enda við eini frásjónargerð av evninum.

Teksttilfar er altíð knýtt at kjakandi greinini – tað kann vera munnligt, skrivligt ella margháttað. Í greinini hjá tær skalt tú gera lesaranum greitt, hvørji høvuðssjónarmið og -grundgevingar eru. Ætlanin er, at tú skalt taka tað við, sum hevur týdning fyri tína kanning, eitt nú við dømum frá tekstinum ella við at endurgeva beinleiðis. Eisini skalt tú taka onnur sjónarmið og dømi við, sum kunnu stuðla tínum grundgevingum. Hesi sjónarmiðini kunnu vera frá einum øðrum teksti ella sjónarmið, sum tú sjálv/ur orðar. Dømini hjá tær kunnu vera frá egnum upplivingum, sum hava týdning fyri evnið, ella onkrum, sum tú hevur lisið ella sæð í undirvísingini, í bløðum, á netinum, í sjónvarpinum ella líknandi.

Tað, sum sermerkir góðu kjakandi greinina, er, at evnið verður kannað væl við neyvum sjónarmiðum, týðandi dømum og próvgrundum.

**Vanlig skrivihátttaløg**: grundgeva, vísa dømi, greiða frá, lýsa, kjakast.

**Tekstsløg, sum minna um**: blaðgreinar, kjakíkast, teigar, kjak á sosialum miðlum, kjaksendingar, politiskar røður, oddagreinar, bloggíkast.

## Góð ráð

- Les allar uppgávuorðingarnar og hugsa teg væl um, áðrenn tú velur uppgávu. Tað er ikki neyðugt at lesa allar tekstirnar.
- Les tekstin/tekstirnar, tú hevur valt at skriva um, fleiri ferðir. Legg merki til viðkomandi teksteyðkenni og skriva hugskot og tankar niður, meðan tú lesur.
- Ansa eftir, at tú svarar allari uppgávuorðingini.
- Ansa eftir, at uppgávusvarið samsvarar viðmerkingini til uppgávuorðingina.
- Minst til at brúka viðkomandi faklig hugtøk.
- Tillaga inngang og útgang, tá ið tú ert liðug/ur, so hesi skapa samanhang í tekstin.
- Ansa eftir, at setningarnir ikki verða ov langir.
- Rættles væl fleiri ferðir og nýt hjálparmiðlar sum orðabøkur og rættstavara, um hesi eru tøk.